## Nýggjárshald í Runavík

Aftur í ár skipar nýggjársnevndin fyri nýggjárshaldi á kaiini í Runavík. Byrjað verður kl. 23.30 við kyndlagongu oman á kaiina. Kyndlagongan fer úr tveimum støðum, frá Rókini og Glyvra skúla. Bill Justinussen heldur nýggjársrøðuna á midnátt, og stóra bálið verður tendrað.

Harumframt verður skipað fyri felagssangi og fýrverkið verður skotið.

Nevndin heitir á fólk um at brúka trygdarbrillur.

Kl. 1 spælir orkestrið Kíkar úr Eysturoynni til nýggjársdans í Støkkhøllini á Glyvrum.

## Deja Vu í Kagganum

Dreymarokkararnir úr Deja Vu spæla í Kagganum í kvøld frá klokkan 21. Deja Vu góvu fyrr í ár fyrstu fløguna hjá bólkinum út. A Place To Stand On.

Síðan útgávuna er gittarleikarin Rói Christiansen skiftur út við Rasmus Rasmussen, ið umframt at spæla gittar við Makrel, er kendur sum ein tann gávuríkasti ungi tónasmiðurin í Føroyum.

Á AME fyrr í ár varð Rasmus kosin besti gittarleikari í Føroyum. Við einum stórum tónleikanavni sum Deja Vu bjóðar Kaggin enn einaferð til eitt frálíkt tónleikahóskvøld í kjallaranum, ið spakuliga er við at gerast eitt vælumtókt spælistað hóskvøld.

**nud**

## Nýggjur superbólkur í Sørvágs Bio

Sólva & Villmenn fer at spæla til dans í Sørvágs Bio gamlaárskvøld. Dansurin verður aftaná midnáttarrøðuna hjá borgarstjóranum.

Trummuspælarin hjá Villmonnum er í USA í jólafrítíð, so vanligi sangarin Finnur Joen Jacobsen setur seg handan trummurnar. Í hansara stað kemur Sólva Ford, ið serliga er kend fyri samstarvið við Georg eystan Á, ið bólkum sum Bergmenn og Tám.

Sólva er framúr kontrisangarinda meðan Finni Joen Jacobsen hata kontri, hetta kann gerast eitt stuttligt bland av kærleika og hatri.

nud

# Samskiftisdeildin í Føroya Banka fullmannað

**Við fleiri væl kendum og -profileraðum andlitum, hevur Føroya Banki av álvara styrkt um menningar- og samskiftisdeild sína**

STARVSSETANIR



*Manningin á menningar- og samskiftisdeildini í Føroya Banka*

Í tíðindaskrivi sigur Føroya Banki, at nýggja deildini nú er fullsett og klár at taka av avbjóðingunum, sum framtíðin fer at bjóða. Deildin verður umframt leiðaran, Johnny í Grótinum, mannað við fýra verkætlanarfólkum og einum samskiftisfólki. Verkætlanarfólkini eru Brian Smedemark, Brynhild Høgnadóttir, Brynhild Setberg og Kristina Háfoss. Nýggja samskiftisfólk bankans er Uni Arge.

Brian Smedemark er 25 ára gamal og ættaður av Tvøroyri. Eftir ætlan letur hann inn sína høvuðsuppgávu í búskaparfrøði í januar 2006, soleiðis at hann sum nýklaktur cand.oecon av Århus Universiteti kann fara til verka í bankanum 1. februar.

Brynhild Høgnadóttir er 37 ára gomul, ættað úr Havn og búsitandi á Velbastað saman við manni sínum og teirra trimum synum. Brynhild er bankaútbúgvin og útbúgvin verkfrøðingur frá Ingeniørhøjskolen í Ballerup. Hon hevur síðstu fýra árini starvast í bankanum, har hon millum annað hevur ment eitt nýtt konsept fyri virkna kundarøkt.

Brynhild Setberg er 41 ára gomul og býr í Havn, haðani hon eisini er ættað. Síðani Brynhild fyri 10 árum síðani nam prógv sum cand.merc á Copenhagen Business School, hevur hon einamest starvast við virkismenning. Fyrst á donsku sjúkratryggingarfyritøkuni IHI, har hon millum annað hevði ábyrgdina av at tryggja fyritøkuni atgongd til spanska marknaðin, og síðani á Tryggingarfelagnum Føroyar, har hon síðstu árini hevur verið marknaðarleiðari.

Kristina Háfoss er 30 ára gomul, ættað av Argjum og búsitandi í Hoyvík saman við manni sínum og teirra tveimum børnum. Kristina hevur embætisprógv í bæði løgfrøði og búskaparfrøði av Keypmannahavnar Universiteti. Hon hevur síðstu tvey árini starvast í Landsbanka Føroya, har hon millum annað hevur fingist við at menna føroyska virðisbrævamarknaðin, VMF.

Uni Arge er 34 ára gamal, ættaður út Havn, har hann eisini er búsitandi saman við unnustuni og teirra tveimum døtrum. Uni tók prógv sum journalistur í 1999 og hevur síðan tá starvast sum tíðindafólk á m.a. Dimmalætting, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya. Síðsta ár royndi Uni seg eisini sum rithøvund við bókaútgávuni "Komin er nú onnur øld", sum viðgjørdi viðkomandi samfelagslig viðurskifti.

# Sangskeið í Suðuroynni

**Sangskeið verður í Suðuroynni í januar 2006. Susanne Brattaberg, diplomlærari, undirvísir. Einsta treyt fyri at taka lut er sanggleði, og at tú dugir eitt lítið sindur av nótum og hevur hug at læra**

SANGUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Sangskeið í Suðuroy í januar 2006. Susanne Brattaberg diplomlærari undirvísir.

At syngja er stuttligt, tað er klárt. Í hvørjum einstøkum av okkum býr ein góð rødd. Nógv av okkum vita hetta væl, hjá øðrum er hetta kanska eitt sindur óvist, tey vita kanska ikki heilt enn, um teirra røtt er nakað serstakt. Tykkum, sum dáma væl sang, hava nú møguleikan at finna útav tí!

Við einføldum venjingum, kunnu vit fáa røddina størri, hægri, lægri og breiðari, hetta er alt tað, sum man droymir um, tá ið ein hoyrir góðan sang. Tað er at samanlíkna við ítrótt – við venjing kann man betra røddina sera nógv.

Tær nýtist ikki serlig førleikakrøv fyri at luttaka í sangskeiðnum. Grundarlagið er stuttleikin at syngja og at tit duga eitt sindur at lesa nótar. Aldurin hevur einki at siga, bert hugurin at læra.

Undirvísingin verður í Vágs kirkju seinnapartar millum kl.14.og 17. og millum kl. 19. og 22 á kvøldið. Skeiðið byrjar mánadagin 9. januar til fríggjadagin tann 13.

Undirvísingin verður í smáum bólkum og tey, sum hava hug, kunnu eisini fáa einaundirvísing. Somuleiðis kunnu tit melda tykkum til passiva undirvísing, ið merkir, at tit tá einans eru til steðar, har onnur fáa sangfrálæru og kunnu fylgja við har. Hetta er eisni læruríkt.

Sangtilfar fáa tit, tá ið tit møta til sangvenjingina, og arbeitt verður fram ímóti at hava konsert við tí, tit hava lært.

Tað verður pláss fyri 15 næmingum.

Tilmelding og nærri um kostnað og annað á telefon 574006 ella teldupost Sirri@sirri.fo innan týsdagin 3. januar.